DAGSINS MEINING

Landsst‡ri› eigur at leggja frá sær

Politiski pallurin í Føroyum er óruddligari enn hann hevur veri› í mong mong ár, eftir miseydna›u samrá›ingarnar í Keypmannahavn hósdagin millum stjórnina og landsst‡ri›.

Sta›festast kann, at høvu›ssetningurin hjá hesum landsst‡rinum at skipa Føroyar sum fullveldisríki er fokin. Hetta ásanna›i eisini bæ›i løgma›ur og varaløgma›ur meiri og minni í vi›merkingum eftir tær miseydna›u samrá›ingarnar.

Tá ein stjórn - ella landsst‡ri› í okkara føri - ikki røkkur á mál vi› einum høvu›smáli, leggur stjórnin frá sær. Hon letur anna›hvørt a›rar flokkar koma framat ella skrivar hon út n‡val til tjó›artingi›.

Men vit hava enn torført at venja okkum til parlamentariskar si›ir, og landsstyri› hevur longu bo›a› frá, at ta› ver›ur sitandi, og fer í sta›in at stinga eina n‡ggja kós út í korti›.

Henda kós ber m.a. í sær, at Føroya fólk á eini fólkaatkvø›u skal taka stø›u til, um Føroyar skulu gerast ein sjálvst‡randi tjó›! Solei›is skiltu í hvussu er teir flestu síggjararnir og lurtararnir landsst‡rismanningina hóskvøldi›.

Kanningarnar hava víst, at flestu føroyingar halda, at vit sum fráli›ur skulu gerast sjálvst‡randi, men spurningurin er nær, og hvussu tillagingartí›in ver›ur. Ein fólkaatkvø›a vi› hasi ætlanini kann tí ikki gerast anna› ennn "bóndafangari".

Vi› at gera spurningin "um føroyingar eru ein tjó› vi› sjálvsavger›arrætti" flutti landsst‡ri› eyguni burtur frá tí veruliga trupulleikanum, sum er tann fíggjarligi spurningurin og tann búskaparliga skiftistí›in.

Allir føroyingar ásanna, at føroyingar eru ein tjó›, og ta› ver›ur eisini sagt í heimast‡rislógini og í øllum fyritreytunum fyri hesi lóg. Løgfrø›ingurin, Halgir Winther Poulsen, sló eisini fast í Útvarpinum, at hetta er ikki ein spurningur, sum skal umrø›ast vi› donsku stjórnina á verandi stigi í samrá›ingunum. Tann dagin, Føroyar hava fingi› fullveldi, hava vit eisini øll tær altjó›arættarligu heimildir, sum sjálvstø›ug lond hava.

Vi› taktiskum snildi eydna›ist løgmanni at grugga máli› um tann fíggjarliga spurningin, tí hann og landsst‡ri› eru fullgrei› yvir, at Føroya fólk høvdu sagt nei til fullveldi ella sjálvst‡ri vi› f‡ra ára skiftistí›.

Tann frægasta lei›in til sjálvst‡ri› er tann hóvliga lei›in, sum Javna›arflokkurin hevur mælt til, og sum ein meiriluti í Tiginum hóast alt er fyri, tá vit hugsa um persónligu meiningina hjá fólkafloks- og sjálvst‡risflokstingmonnunum. Um ta› er eina slíka kós, landsst‡ri› fer at stinga út í korti›, fáa vit at síggja í politiska or›askiftinum í komandi tí›um.

Men rættast hev›i veri›, um landsst‡ri› leg›i frá ær, og skriva›i út n‡val til Løgtingi›.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Gullbrúdleyp í Klaksvík

Í dag, leygardagin 28. oktober, hava Mása og Jógvan Tróndheim í Klaksvík gullbrúdleyp.

Tá tey giftust fyri 50 árum sí›ani, fluttu tey í húsini, har Jógvan Tróndheim var uppvaksin, og tey hava bú› á Stongunum sí›ani tá. Mása og Jógvan eiga f‡ra børn, sum øll búgva í Klaksvík. Tey eru Gerhard og Elfinn, sum bá›ir eru maskinmenn og sigla úti, Maria, sum er lærari, og Eilen, sum b‡r heima hjá foreldrunum.

Jógvan Tróndheim er ætta›ur úr Leirvík, men hann vaks upp á Stongunum í Klaksvík hjá Lisu og Eliseus Jacobsen. Mása er ætta› úr Árnafir›i, men hon vaks upp á Stongunum hjá Marit og Reinhold Jacobsen.

Jógvan hevur í mong ár havt prentstovu í kjallaranum í heiminum á Stongunum. Har hevur hann eisini pappírshandil, sum eisini selur ymiska skrivstovuútger›.

Mása og Jógvan hava altí› havt sína gongd í Betesda, og ta› er har, at tey í kvøld hava vælkomst veitslu.

Gullbrúdleyp í Havnini

Sí›sta leygardag, 21. oktober, høvdu hjúnini Judith og Osvald Kjærbo í Havn veri› gift í 50 ár.

Tá tey giftust fyri 50 árum sí›ani, fluttu tey inn í n‡ggj hús úti í Grønlandi, har nógv hús vór›u bygt í fimti árunum. Tey bæ›i hava øll árini bú› í J. Nolsøesgøtu 17. Judith og Osvald eiga fimm dørtrar. Tær bá›ar elstu, Anna og Katrin, búgva í Havnini, mi›lingadótturin, Kristvør, b‡r í USA, og tær bá›ar yngstu, Gu›run og Jórun, búgva í Keypmannahavn.

Osvald, sum er ætta›ur úr Sumba, hev›i í mong ár umbo› og heilsølu, m. a. umbo›a›i hann tógv, skógvar og undirklæ›i. Umframt at hava vitja› nógva sta›ni kring landi› í arbei›sørindum, so munnu fólk alla sta›ni kring landi› kennast vi› Osvald Kjærbo, tí hann hevur vitja› í sambandi vi› evangeliska tænastu. Hann hevur hildi› møtir í salum og í túnum, og hann hevur vitja› í húsunum.

Osvald hevur í mong ár havt ábyrgdina av Emmaus bíbliubrævskúlanum í Føroyum, og hann var ein av teimum, sum tók stig til, at Evangeliska Røddin mi›skei›is í seksti árunum fór at varpa kristiligar útvarpssendingar út á Trans World Radio í Montecarlo.

Ta› kemur ikki ofta fyri, at ein gullbrú›ur eigur mammu á lívi. Men ta› ger Judith Kjærbo. Mamma hennara eitur Anna Sofía Jacobsen. Hon b‡r á Argjum og fylti 100 ár 16. mars í ár. Anna Sofía, sum er ætta› úr Skorini á Ei›i, var gift vi› Dániali Jákup Jacobsen ella Dániali Jákup í Skipshandlinum.

Judith og Osvald hátí›arhildu gullbrúsleypsdagin í Ebenezer. Leygarkvøldi› vóru fleiri enn fimm hundra› fólk komin saman at gle›ast saman vi› gullbrú›arparinum.

Skald hei›ra›

3. novembur klokkan 17:00 ver›ur kvøldseta í Tilhaldinum í Havn Jens Paula Heinesen, skaldi, til hei›urs. Ta› er Havnar Sjónleikarfelag, sum tekur stig til at heilsa høvundanum og hetta ver›ur gjørt í samband vi› at Jens Pauli Heinesen fekk Mentunnarløn Landsins í fjør. Havnar Sjónleikarfelag heilsar høvundanum, tí hesin hevur sett sín dám á føroyska leikpallin.

Jens Pauli Heinesen ver›ur heilsa›ur vi› brotum úr egnum skaldskapi og ta› ver›a navnfrom leiklistafólk, sum fara at lesa og syngja. Frásøgufólk er Gulla Øregaard og annars eru Høgni Joensen, Eva Brekkstein, Sverri Egholm, Gunhild V. Michelsen, Eyrith Leyni, Lív Dam og Herluf Lützen. Lagt til rættis hava Lina Larsen og HS - bólkurin.

Jens Pauli hevur ríka› føroyska bókmentaheimin í mong Harrans ár og eins og vi› víni, so búnast skaldskapurin, eldri hann gerst. Alt fleiri taka Jens Paula til sín og í frálæru í skúlunum í dag fyllir hann meira og meira. Ta› hevur fört vi› sær, at ungfólk í dag eisini eru farin at tosa um skaldskapin hjá sandavíkinginum Jens Paula Heinesen. Og ungdómurin er framtí›in, so verki› hjá skaldinum ver›ur lív laga› langt inn í hesa øld og eisini eftir at livandi skaldi› hevur skoti› hamin, mold og leir.

je

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Ey›un Elttør stillar upp

KOMMUNUVAL
Ey›un Klakstein

Klaksvík: Sjálvst‡risflokkurin hevur nú sett nøvn á tey valevni, sum skulu manna listan hjá flokkinum til b‡rá›svali› í Klaksvík.

Farnu f‡ra árini hevur flokkurin havt ein b‡rá›slim, og ta› hevur veri› Karl Heri Joensen, sum eisini stillar upp hesafer›.

Landsst‡risma›urin, Ey›un Elttør, ver›ur eisini vi› á listanum hjá Sjálvst‡risflokkinum, hóast hann, um alt gongur sum ætla›, ikki kann taka sæti í b‡rá›num komandi hálva anna› ári›, skuldi hann veri› valdur.

Landsst‡risma›urin, Ey›un Elttør, ver›ur eitt av valevnunum hjá Sjálvst‡risflokkinum til b‡rá›svali› í Klaksvík.

Umframt Karl Hera og Ey›un eru hini valevnini: Jóanes Bólstein, Frida Johanna Christiansen, Jan Gardar, Omi Joensen, Andrias Josephsen, Jonny Olsen, Julius Poulsen og Petur Martin Solmunde.

Nú er ta› bara Kristiligi Fólkaflokkurin, sum manglar at almannagera sín lista til b‡rá›svali› í Klaksvík.

Uppbo›ssølan keypt bygning

UPPBO‹SSØLA
Ey›un Klakstein

Klaksvík: Gólvuppbo›ssølan í Klaksvík hevur keypt bygningin, sum teir halda til í á Kósini.

Hetta skrivar lokalbla›i› Nor›l‡si› í gjár.

Ta› er Kósin, sum hevur átt bygningin, men virki› hev›i ongar ætlanir um at brúka hann til naka›, og tí var› hann seldur Uppbo›ssøluni.

Einki er uppl‡st um prís, men Hanus Hansen, stjóri, sigur vi› Nor›l‡si›, at teir fingu eitt so miki› gott tilbo›, at teir hildu ta› ver›a rættast at selja bygningin.

Chase sett evstamark

Føroyski rockbólkurin fer 1. desember at avgera, um n‡ggja fløgan, sum bólkurin ætlar at gera, ver›ur veruleiki

TÓNLEIKUR
Ey›un Klakstein

Rockbólkurin Chase umhugsar at koma afturíaftur vi› n‡ggjari fløgu komandi ár, men enn er ikki avgjørt, um ætlanin bara ver›ur prát, ella um fløgan gerst veruleiki.

– Vit eru byrja›ir at skriva løg, og okkurt um fimm hugskot eru fødd higartil. Vit rokna vi› at skriva løg fram til 1. december. Tá vóna vit at hava okkurt um 15 hugskot klár, og so skal endalig avger› takast, um fløgan skal gerast. Løgini ver›a sostatt avgerandi fyri, hvørja lagnu ætlanin fær, sigur Edmund Jacobsen, sum var sangari í tiltikna bólkinum, á heimasí›uni hjá bólkinum.

– Enn hava vit ikki avgjørt, um vit skulu leggja okkum eftir einari stakfløgu ella eini vanligari fløgu. Og vit vita heldur ikki, um allir sangirnir ver›a á føroyskum ella ein blanding av enskum og føroyskum, sigur Edmund.

Brúka interneti›

Ta› eru teir tríggir Edmund Joensen, Niclas Johannesen og Mikkjal Joensen, sum eru farnir at putlast vi› ætlanina at gera n‡ggjan tónleik til Chase.

Ein trupulleiki, sum teir skulu strí›ast vi›, er tann, at teir eru at finna í hvør sínum landi. Edmund er í Danmark, Mikkjal í Føroyum og Niclas er í løtuni í Kanada.

Men práti› og b‡ti› av hugskotum fer fram umvegis interneti›.

– Tá i› vit eru staddir so langt frá hvørjum ø›rum, spælir interneti› ein t‡›andi leiklut í arbei›num. Vit senda dagliga teldubrøv til hvønn annan um ymisk praktisk ting, og vit senda javnan løg og hugskot sum MP3-fílar umvegis neti›, sigur Edmund Joensen.

Heimasí›an hjá Chase er at finna á adressuni www.easy.to/chase.

Fyrsta dagin í desember skal avger›in takast um ætla›u fløguútgávuna hjá rockbólkinum Chase

Pierre Fabre
á Tjaldurs Apoteki

Tjaldurs Apotek kann nú bjóða kundum sínum teir viðurkendu fronsku úrdráttirnar frá Pierre Fabre. Tilbúningarnir verða framleiddir á fýra starvsstovum, ið við sínum drúgvu royndum og vitan eru fremstir á altjóða marknaðinum...



Avène
Á Starvsstovuni eru serfrøðingar í framleiðslu av tilbúningum til viðkvæma og ovurviðkvæma húð.

DUCRAY
Starvsstovan, innan húðrøkt eru serfrøðingar í húð- og hártilbúningum.

ELANCYL
Starvsstovan kann bjóða teir mest virknu tilbúningarnar í húðrøkt.

LABORATOIRES KLORANE
Starvsstovan hevur 30 ára royndir í framleiðslu av smábarna- og hártilbúningum – framleiddir úr plantuúrdráttum.

Pierre Fabre

Lise-Lotte frá Pierre Fabre verður at hitta á Tjaldurs Apoteki týsdagin 31. okt. og í Apoteksútsøluni í Runavík hósdagin 2. nov.
Støkki inn á gólvið og tosið við starvsfólkið, ið kunnu geva apotekskundunum eina góða kunning um teir mongu spennandi tilbúningarnar og vegleiða í nýtsluni av teimum.

Tjaldurs Apotek • R.C. Effersøesgøta 31 • 100 Tórshavn • Tel. 34 11 00
Apotekssølan • 620 Runavík • Tel. 44 93 66
www.apotek.fo